## Mercedes steðgar á

Fíggjarkreppan ger eisini um seg í bilídnaðinum. Í gjár kunngjørdi leiðslan í týsku fyritøkuni Mercedes-Benz, at verksmiðjan í býnum Siedelfingen steðgar framleiðsluni tann 11. desember, og at arbeiðið fer at liggja stilt tær næstu fimm vikurnar. Á hinari verksmiðjuni, sum er í Stuttgart-Untertürkheim, steðgar arbeiðið tann 15. desember og verður ikki tikið uppaftur fyrr enn tann 12. januar. Leiðslan í Mercedes-Benz sigur, at hóast eingin bilur verður gjørdur í steðginum, fáa starvsfólkini á báðum verksmiðjunum fulla løn undir steðginum.



# Lívshættisligt at kava undir verandi fyritreytum

**Kavarar vilja stovna fakfelag . Tað serliga við hesum fakfelagi er, at tað er ein arbeiðsgevari, ið er ein av stigtakarunum. – Vit mugu gera okkurt fyri at betra um trygdina hjá okkara kavarum, sigur Símun Jákup Højsted, ið sjálvur hevur kavarafyritøku**

FAKFELAG

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

21. novembur verður stovnandi fundur um fakfelag fyri kavarar. Tað eru nakrir, ið hava tikið seg saman at skipa seg í fakfelag, fyri at betra um trygdina hjá kavarum. Serliga er talan um kavarar við útbúgving og útgerð, ið er nútímans, ið fýlast heilt nógv á støðuna í vinnuligari kaving í Føroyum.

Ætlanin við fundinum er antin at endurstovna gamla felagið, ið kallaðist Vinnufelag føroysku froskmanna, ella at stovna nýtt fakfelag.

Tað óvanliga við hesum felagið, er, at tað eisini eru arbeiðsgevarar, ið vilja hava hetta felag.

- Trygdin innan kaving í Føroyum er út av lagi vánalig. Í mun til grannalondini hjá okkum stendur heilt illa til hjá okkum. Eisini er sera stórur munur á, hvat menn taka fyri at gera kavingararbeiði í Føroyum, og tá hevði tað verið gott, at skipað fyri onkrum slagið av minstu løn, so mann altíð fær havt trygdina í hásætið, sigur Símun Jákup Højsted.

### Útbúgving er ein forðing

Ingi Sørensen, ið er kavari og hevur nomið sær útbúgving innan kaving í Noregi, hevur ilt við at lata vera við at øsa seg um støðuna í Føroyum.

- Tað eru alt ov nógvir, ið arbeiða fyri undirprís, og hetta ger, at teir, ið hava goldið nógv fyri sína útbúgving fáa ein trupulleika. Eg haldi tað vera forkastiligt, at menn við lítlari og ongari útbúgving gera arbeiðir, ið krevja nógv hægri útbúgvingar enn teir hava. Fyri mær er tað sum um ein maður við koyrikortið til prutl fekk uppgávuna at koyra buss, og tað hevði ongin gingið við til. So galin er støðan hjá okkum, og tí mugu vit gera nakað við tað, sigur Ingi Sørensen.

### Lívshættisligt uttan lógir

Ingi Sørensen greiðir eisini frá, at ein av orsøkunum til, at teir vilja stovna fakfelag, er fyri, at teir saman kunnu fáa arbeiðseftirlitið at kanna arbeiðið hjá teimum betri.

- Tað er ein lóg í Føroyum um kaving, men hon verður øgiliga sjáldan hildin, tí arbeiðseftirlitið ger onki við tað. Í londunum rundan um okkum fáa teir, ið kava uttan loyvi so stórar bøtur, at fyritøkurnar fara á heysin, um teir ikki halda lógirnar. Hetta sakna vit í Føroyum, tí tað er beinleiðis lívshættisligt hjá kavarum, sum arbeiða undir umstøðunum, ið arbeiðseftirlitið sær út til at góðtaka, sigur Ingi Sørensen. Hann leggur afturat, at hann heldur tað vera serstakliga løgið, at tað eru kavararnir sjálvir, ið mugu biðja um eftirlit, so teir verða noyddir at halda seg til galdandi lógir.

### Nógvir mangla útbúgving

Kavararnir, ið Sosialurin hevur tosað við, meta tað vera serstakliga keðiligt, at vinnan nýtir so nógvar kavarar uttan nøktandi útbúgving.

- Tað er løgi, at menn, ið bert hava loyvi til at kava niður á 12 metrar gera arbeiðir í aliringum, ið eru 25 metrar djúpir. Tað er lutfalsliga nógv, ið doyggja av at kava, og tað eru næstan altíð teir, ið ikki hava útbúgving, sum tað gongur útyvir, greiðir Ingi Sørensen frá.

Allir kavarar eru tó vælkomnir til fundin. Fyriskipararnir vóna harvið, at allir, ið vilja arbeiða innan vinnuliga kaving í Føroyum nema sær hóskandi útbúgving innan økið.

Tilmeldingin til stovnandi fundin fer fram á *vinnuligkaving@gmail.com* og fundurin verður 21. novembur klokkan 19.00 á Hotel Tórshavn.

## Vit gera tað vit kunnu

**Karl Joensen, stjóri á Arbeiðseftirlitinum, metir ikki at støðan er so ring, sum kavararnir, Sosialurin hevur tosað við, gera hana til.**

**- Vit gera sum so ikki nakað uppsøkjandi arbeiði. Kavaralógin er eitt serligt øki, og vit hava í løtuni ikki nakað fólk, ið arbeiðir við tí burturav. Hinvegin fara vit altíð út, tá vit fáa boð um at kanna ymisk viðurskifti, men tá eru tað sum oftast útgingin vinnubrøv og ikki lívshættisligar arbeiðsumstøður. Og tað er heldur ikki altíð, at tað fer nakað ólógligt fram, tá vit fara út at kanna eina fráboðan, greiðir Karl Joensen frá.**

**Sambært stjóranum á Arbeiðseftirlitinum vanta eisini fastar mannagongdir.**

**- Innan kaving er tað í løtuni serliga okkara uppgáva at veita vinnubrøv og endurnýggja tey. Lógin um vinnuliga kaving er klár, og tað verður arbeitt við at geravantandikunngerðirnar, sigur Karl Joensen. Hann leggur afturat, at í framtíðini fara helst at vera betri fíggjarligir møguleikar at gera hetta arbeiði, tí tá fara teir helst at taka eitt gjald fyri teirra arbeiði.**